umborð

# Dekkarin er eisini reiðari

## Í gjár hittu vit dekkaran, reiðaran og skipaeigaran, Bjarka Magnussen úr Húsavík, á vestaru bryggju í Havn

### Umborð



Vilmund Jacobsen
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Í góðveðrinum í gjár koyrdu vit ein túr út á vestaru bryggju í Havn at vita, um vit kanska fingu í lag eitt prát um fiskivinnu. Brimil og Tjaldrið lógu báðir við bryggju, men vit hava so nýliga havt prát við menn umborð á hesum skipum. So, vit valdu at leita eitt sindur meira. Skip hjá Aksel Hansen lógu eisini við vestaru bryggju, men hesi hava nú ligið so leingi, at neyvan nakar maður fanst umborð ella við bryggjukantin.

Úti á arminum, sum gongur út frá bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju, lá ísfiskatrolarin Eysturbúgvin, sum P/F Vørðustíggjur í Húsavík eigur.

Við afturendan av skipinum stóðu tríggir mans, tveir smiðjumenn og ein maður, sum kundi verið maður umborð – ella reiðari á skipinum.

Annar smiðjumaðurin kemur nú gangandi ímóti okkum, og vit spyrja, um nakar maður er á bryggjuni, sum hoyrir til Eysturbúgvan.

- Jú, maðurin undir liðini á smiðjumanninum har úti er reiðarin, Bjarki Magnussen.

Vit koyra út á armin, har skipið liggur og spyrja, um vit kunnu skifta orð um vinnu eitt bil.

- Jú, tað er gamaní, sigur reiðarin, sum eigur part í skipinum og eisini siglir sum dekkari við Eysturbúgvanum.

Hann sigur, at teir vóru átta, sum keyptu skipið í 1994, men í dag eru teir bert fýra eftir.

- Vit, sum eiga skipið í dag, eru eg sjálvur og beiggi mín, Bergur Magnussen, sum eisini býr í Húsavík. Hinir báðir eru skiparin, Jóan Petur í Soylu, sum býr á Sandi og kokkurin, Heðin Joensen, sum býr í Havn.

Bjarki sigur, at tað er sama felag, P/F Vørðustíggjur, sum hevur átt skipið øll árini, síðan teir keyptu og stíggjurin, sum talan er um, liggur á markinum millum Dal og Húsavík.

- Vit partrola saman við Vesturbúgvanum, ið øll árini hevur borið sama navn. Eysturbúgvin er fyrrverandi Gullberg, og bæði skipini eru smíðað á Tórshavnar Skipasmiðju fyrst í nítiárunum.

Við Eysturbúgvanum eru sjey mans hvønn túrin, og tríggir eru í landi. Soleiðis eru 10 mans knýttir at skipinum, og teir býta inntøkurnar ímillum sín gjøgnum árið.

Eysturbúgvin hevur verið á beding og hevur annars ligið við bryggjukantin tað mesta av einum mánaða.

- Eins og Vesturbúgvin, hava vit eisini fingið okkum størri slengrikjølar, umframt at maskinan er yvirhálað. Maskinan stóð fyri klassing, og hetta arbeiði er nú um at verða liðugt. Vit vóna, at klárt verður at loysa aftur týsdagin í komandi viku.

Bjarki sigur, at maskinan á Vesturbúgvanum bert er eini trý ára gomul, og tí hevur hon ikki verið til klassingar.

- Slengrikjølarnir vórður lidnir á skipasmiðjuni, áðrenn skipini vórðu tikin upp, og tí tók hesin parturin av arbeiðnum bert 14 dagar. Nú maskinan hjá okkum haraftrat er klassað, hevur Vesturbúgvin bíðað eftir okkum í einar 14 dagar.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin eru millum skipini, sum hava gulllaksaloyvi, og tey hava eisini verið á gulllaksi fleiri undanfarin ár.

- Jú, eg vænti, at gongdin verður hin sama í ár, og tá vit loysa aftur - vónandi í komandi viku - verður helst farið á gulllaks. Árið í fjør var gott og royndin, sum hevur verið higartil í vertíðini hjá eitt nú Polarhav og Stjørnuni og Vestmenningi og Fram, hevur eftir hvat vit hava skilt eisini verið góð.

Bjarki vísir á, at summarið er ikki besta tíðin til upsa, og tí kemur tað væl við, at skipini eisini hava gulllaksaloyvi.

- Er fiskur at fáa, og prísurin ikki fer niður um 3,40 ella 3,50 krónur fyri kilo, plagar gulllaksatíðin at roynast skipi og manning.

Hann sigur, at skipini vóru á gulllaks longri enn vanligt í fjør, og seinastu lastirnar vórðu landaðar til Kollafjord Pelagic.

- Men nú virkið í Kollafirði er stongt, verður eingin fiskur landaður har í hesi vertíðini.

Hann sigur, at meginparturin av gulllaksinum, sum Eysturbúgvin hevur fiskað hini árini, er landaður í Saltangará og virkaður á Tavuni í Leirvík.

- Vanligt er, at skipini, sum eru á gulllaksi í vertíðini, landa einaferð um vikuna, leggur Bjarki aftrat.

Reiðarin og skipaeigarin letur annars hampiliga væl at gongdini, sum verið hevur, síðan teir í 1994 keyptu skipið.

- Jú, eg vil siga, at tað hevur gingið væl øll árini. Nú er tað oljan sum hóttir, og sum longu nú hevur lagt tungar byrðar á fiskiflotan.

Hann sigur, at tað er tungt at reka skip í dag, sum hava stóra skuld at bera.

- Eg vil siga, at um vit ikki partrolaðu og soleiðis spardu ein part av oljuútreiðslunum, hevði hetta slett ikki gingið. Ilt er at siga, hvussu verður vorðið hjá stórum parti av okkara fiskiskipaflota, um prísvøksturin í oljuni ikki steðgar.

Bjarki letur annars væl at fiskiskapinum og vísir á, at upsin hevur verið ógvuliga støðugur nú í fleiri ár.

- Fiskurin hevur eisini verið munandi størri í vetur og í vár, enn hann annars hevur verið seinastu undanfarnu árini, tá slagið var rættiliga smáttfallandi.

Húsvíkingurin byrjaði at sigla sum ungur, og longu sum 15 ára gamal var hann á laksaveiði við Leiki í Grønlandi.

- Vit royndu við gørnum, men á túrinum løgdu vit um til svartkalvaveiði. Hetta gjørdist ein drúgvur túrur, sum vardi í einar fimm mánaðir. Skipari var Hákun Jensen úr Havn, sum var ein av eigarunum av Leiki.

Bjarki var nakrar túrar við Leiki, og hann heldur ikki, at menninir hugsaðu so nógv um, at onkrir av túrunum gjørdust so drúgvir.

- Men hetta hevði neyvan gingið í dag, leggur hann aftrat.

Í sjeytiárunum var hann við kraftblokki við Ísborg, og hetta lívið dámdi honum sera væl. Skipari var Sverri Joensen við Norðskála.

- Jú, hetta var eitt deiligt lív, sigur hann.

Bjarki var í sínari tíð eisini við dalstrolaranum Stígarkletti, og har var hann, til skipini fóru undir hamaran í kreppuárunum.

Men dekkarin, reiðarin og skipaeigarin úr Húsavík hevur eisini gjørt annað enn siglt, hóast sjógvurin í stóran mun hevur verið lívið hjá honum.

- Í 1983 gjørdist eg útbúgvin timburmaður hjá Danberg & Sørensen, men havi fingist lítið við hetta arbeiði síðan.

Og tó.

Nakað hevur hann kortini smíðað, men ongantíð sum meistari.

- Eg smíðaði okkurt skifti hjá øðrum meistarum, men tað var sjógvurin sum dróg.

Húsvíkingurin sigur at enda, at Eysturbúgvin hevur góða og støðuga manning, harav fleiri hava verið við skipinum øll árini.

- Hetta hevur havt velduga stóran týdning fyri raksturin og gongdina annars, sigur Bjarki Magnussen.



*- Um vit ikki partrolaðu og soleiðis spardu ein part av oljuútreiðslunum, hevði hetta slett ikki gingið. Ilt er at siga, hvussu verður vorðið hjá stórum parti av okkara fiskiskipaflota, um prísvøksturin í oljuni ikki steðgar, sigur Bjarki Magnussen, reiðari og skipaeigari Mynd: Vilmund Jacobsen*